**Skjal L1**

**From:** Heri Joensen
**Sent:** Thursday, November 22, 2018 3:44 PM
**To:** Høgni Joensen <hognij@logting.fo>
**Cc:** Rógvi Reinert <Rogvi.Reinert@fisk.fo>; Høgni Karsten Hoydal <hogni.hoydal@fisk.fo>
**Subject:** FLU2018 §5

Her er svar vegna landsstýrismannin til spurningar tykkara frá 19. november 2018:

**Fíggjarnevndin spyr hví lønarútreiðslurnar til Landbúnaðarroyndir og ráðgeving økjast munandi í 2019 í mun til 2018.**

SVAR: Ein partur fer til lønarhækkingar, ein partur fer til úllamóttøku og annars skal størri orka leggjast í at orðað landsbúnaðarpolitikk. Vit mugu tó ásanna at umleið ein triðingur av hesi hækking átti at verið koyrd á konto 14 heldur enn 11.

**Fíggjarnevndin ynskir at fáa upplýst hvussu nógvir pengar er settir í Matis-grunnin og hvussu nógvir eru brúktir. Hvør umsitir grunnin? Ber til at fáa eintak av roknskapinum.**

SVAR: Higartil eru 6 mió. kr. settar í grunnin. Av hesum eru 120 tús. kr. brúktar. Fiskimálaráðið og eitt óheft stýrið umsitur grunnin og Fiskimálaráðið hevur roknskaparhaldið. Roknskapurin er í Fíggjarskipan Landsins og verður grannskoðaður av Landsgrannskoðanini. Grunnurin hevur stovnsnummar 6065 og til ber at síggja roknskap grunnsins í Leiðslukunningarskipanini. Sí viðlagda roknskap.

**Fíggjarnevndin ynskir at fáa upplýst hvussu nógvar eftirlitskanningar hava verði á skipum í føroyskum sjógvi, herav hvussu nógv er útlendsk skip ? Hvussu nógvar eftirlitskanningar hava verði av landingum ?**

SVAR: Í 2017 vórðu 118 eftirlit framd til sjós. Harav vórðu 37 útlendsk skip kannað. 112 landingar vórðu kannaðar í 2017. Í 2018 (pr. 21. november) eru 105 eftirlit framd til sjós. Harav eru 32 útlendsk skip kannað. 61 landingar eru kannaðar higartil í 2018.

**Fíggjarnevndin ynskir at fáa upplýst um rokningin til Mest fyri sløkkingina á Varðin Pelagic? Hvør gav boð um at fáa Samson suður?**

SVAR: Okkum kunnugt er rokningin ikki goldin. Umboð fyri Fiskimálaráðið vóru á fundi á Tvøroyri tann 27. sept. 2018 har allir partar luttóku. Eisini hevur annað samskifti verið um málið. Tað er tó enn eitt sindur óvist, hvør bað um at fáa Samson suður.

Vinarliga / Kind regards

Heri Joensen
Fíggjar- og starvsfólkaleiðari / Director of Finance and Personnel

Fiskimálaráðið / Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 55 32 12 • Fax (+298) 35 30 35 • heri.joensen@fisk.fo • www.fisk.fo
skype: herijoe